# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg havi fleiri ferðir sagt, at eg ætli mær at lata Guantanamo aftur, og tað ætli eg mær at gera*

*Barrack Obama*

# KALIFORNIA BRENNUR



*Meiri enn 2.000 sløkkiliðsmenn og fleiri hundrað sjálvboðin royna at basa skógareldinum uttan fyri Los Angeles*

*Mynd: AP*

**800 hús eru farin upp í royk, og umleið 50.000 fólk eru flýdd undan ógvusligum skógareldum við Los Angeles**

Í nátt líktist Los Angeles einum býi, sum var kringsettur av eldi, nú tríggir skógareldar herja økið rundan um stórbýin. Higartil eru umleið 50.000 fólk flýdd undan eldinum, og sløkkiliðini siga, at minst 800 hús eru farin upp í royk.

Eldurin byrjaði hósdagin norðan fyri og vestan fyri býin, men nógvur vindur um vikuskiftið gjørdi, at eldurin breiddi seg ógvuliga skjótt, og tey væl mannaðu sløkkiliðini fingu einki gjørt. Seinni minkaði vindurin, men tá hevði eldurin at kalla kringsett býin, sum er tann næststørsti í USA.

- Eldurin hevur elvt til slíka oyðing, sum eg ikki havi sæð fyrr, segði borgarstjórin í Los Angeles, Anton Villaraigosa, í gjár.

Sløkkiliðini siga, at skógareldarnir við Los Angeles eru teir ringastu, sum hava verið í syðra parti av Kalifornia tey seinastu 50 árini. Nógvastaðni í útjaðaranum á býnum er at kalla alt kolað upp, og í San Fernando-dalinum eru eisini 500 húsvognar farnir upp í royk. Enn hevur løgreglan ikki fingið boð um, at nakar hevur latið lív í eldinum, men myndugleikarnir kvíða fyri, at onkur kann verið brunnin inni.

Í útnyrðing úr Los Angeles búgva nógv fólk av tí betra slagnum, og eisini har eru fleiri hús brunnin í grund.

## Fyrrverandi forseti í hungursverkfalli



*Chen Shui-bian vasrð lagdur í hondjørn, tá hann bleiv tikin*

*Mynd: AP*

**Fyrrverandi taiwanski forsetin Chen Shui-bian góðtekur ikki, at hann er skuldsettur fyri svik og vil ikki eta**

Í gjár var fyrrverandi forsetin so illa fyri, at myndugleikarnir gjørdu av at flyta hann á sjúkrahús. Tá hevði hann ikki etið bitan í 108 tímar.

- Hann mótmælir tí órættvísi, sum rættarskipanin hevur framt ímóti sær, sigur sakførari hansara við tíðindastovurnar.

Chen bleiv tikin seinasta týsdag og skuldsettur fyri at hava svikað fyri 15 milliónir taiwanskar dollarar ella umleið tríggjar milliónir krónur. Hann er eisini skuldsettur fyri at hava tikið ímóti muturi og fyri at hava falsað skjøl. Sjálvur heldur hann uppá, at hann er ósekur, og hann leggur ákæruvaldið undir at vera í lummanum hjá tí Kina-vinarliga stýrinum, sum nú ræður í Taiwan.

- Hetta málið er politiskt forfylging og einki annað, segði Chen herfyri.

## Umstrídd bók um Madeleine McCann kemur út í Bretlandi

**Fyrrverandi portugisiski løgreglumaðurin Goncalo Amaral ætlar, at bók hansara um ta horvnu gentuna skal koma út á enskum. Foreldrini hótta við at stevna**



*Gonzalo Amaral við einum eintaki av upprunabókini*

*Mynd: AP*

Í bókini „Maddie - sannleikin um lygnirnar“ avdúkar Gonzalo Amaral nógvar smálutir frá rannsóknunum, sum portugisiska løgreglan gjørdi, eftir at Madeleine McCann hvarv í Portugal tann 3. mai í fjør. Bókin kom fyrst út á portugisiskum, men er seinni týdd til fleiri mál og er higartil seld í umleið 180.000 eintøkum.

Gonzalo Amaral skrivar í bókini, at hann er framvegis sannførdur um, at Madeleine McCann doyði av einari vanlukku í úbúðini, sum foreldur hennara høvdu leigað í Praia da Luz. Við bretska blaðið The Independent sigur hann seg vóna, at bretar, sum vilja hava sannleikan at vita, fara at lesa bókina, tá hon kemur út á enskum.

Foreldrini hjá Madeleine, Kate og Gerry McCann, hava umvegis talsmannin Clarence Mitchell boðað frá, at tey fara at leggja sak ímóti høvundinum, so skjótt bókin kemur út í Bretlandi.

Portugisiska forlagið, sum hevur útgávurættindini til bókina, sigur, at bókin er longu týdd til enskt, og at samráðingar eru við eitt bretskt forlag um at geva bókina út í Bretlandi. Sambært portugisiska forlagnum hava fleiri bretsk forløg víst bókini áhuga.

Gonzalo Amaral sigur seg eisini hava fingið stuðul úr Bretlandi.

- Tað vóru mong, sum settu seg í samband við meg, tá eg Madeleine-málið bleiv tikið frá mær. Eisini fólk í Bretlandi styðjaðu meg, sigur hann við The Independent.

## STUTT SAGT

### Valskeiðið longt

Undirhúsið í russiska tjóðartinginum samtykti leygardagin eitt uppskot frá Dmitrij Medvedev, forseta, sum hevði skotið upp at broyta lógina, so at valskeiðið hjá einum russiskum forseta verður longt úr fýra í seks ár.

Fleiri eygleiðarar í Moskva halda, at tað er Vladimir Putin, forsætisráðharri og fyrrverandi forseti, sum er maðurin aftan fyri broytingina, tí hon kann tryggja honum enn fleiri ár í forsetaembætinum, um hann velur at stilla uppaftur. Politiskir eygleiðarar siga, at tað er eingi ivi um, at Putin verður afturvaldur, um hann stillar uppaftur til forseta.

Uppskotið hjá Medvedev at leingja valskeiðið hjá forsetanum bar eisini í sær, at valskeiðið hjá tjóðartinginum bleiv longt úr fýra í fimm ár, og tann broytingin bleiv eisini samtykt í undirhúsinum.

### Seychelloyggjarnar IMF-lán

Altjóða Gjaldoyragrunnurin samtykti um vikuskiftið at játta Seychelloyggjunum í Indiska Havinum 26 milliónir amerikanarar dollarar í láni, so myndugleikarnir har kunnu fáa figgjarmarknaðin í landinum aftur á beint.

Pierre Laporte, sum er tjóðbankastjóri á Sechelloyggjunum, sigur við tíðindastovuna Reuters, at lánið frá IMF loysir ikki teir figgjarligu trupulleikarnar, tí skuldin, sum tað almenna hevur fingið at dragast við, er umleið 800 milliónir amerikanarar dollarar, sigur hann. Sambært tjóðbankastjóranum er tilsøgnin frá IMF ein treyt fyri, at onnur lond vilja lata oyggjunum lán til at loysa kreppuna við.

Umframt Seychelloyggjarnar hevur Pakistan fingið tilsøgn um lán úr Altjóða Gjaldoyragrunninum. Í fyrsta umfari er tó bara talan um góðar sjey milliónir dollarar.

Íslendska stjórnin hevur framvegis ikki fingið at vita, um IMF vil læna landinum pengar. Leiðslan í grunninum segði um vikuskiftið, at íslendska umsóknin verður viðgjørd mikudagin.